# ítróttur

Nr. 221 • leygardagur • 16. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Oddurin skilist

**Neistin og VÍF skulu nú dystast um, hvør teirra skal fylgja StÍF, sum á pappírinum hevur lættan dyst um vikuskiftið**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at fult umfar varð leikt í mansdeildini í miðvikuni, verður nakað friðarligari nú um vikuskiftið, tá bert tveir dystir eru á skránni.

Størsti spenningurin undan hesum umfarinum tykist vera í Havn, har VÍF kemur á vitjan hjá Neistanum. Undan dystinum eru bæði liðini ájøvn í stigum á øðrum plássinum á stigatalvuni, og tí verður uppgerðin fyrst og fremst ein dystur um, hvør av teimum nú skal vera fremsti biðilin til oddasessin hjá StÍF.

Skal ein favorittur peikast út undan dystinum, so má tað verða VÍF, sum seinastu vikurnar veruliga hevur prógvað, at teir framvegis eiga ein sera virknan leiklut á føroysku hondbóltstindunum. Eftir eina heldur trilvandi byrjan hava teir seinastu umførini vundið burtur øllum, sum eru komin fyri á teirra leið, og kunnu teir halda so nøkunlunda fast í hesum sunnudagin, so er lítið at ivast í, at enn tvey stig bíða eftir teimum.

Hinvegin, so er einki at ivast í, at teir í Neistanum fara at gera alt tað, sum teir eru mentir, til tess at steðgað nýbyrjaðu sigursgongdini hjá VÍF. Undan kappingarárinum varð mett, at árið hjá Neistanum fyrst og fremst skuldi nýtast til at byggja eitt nýtt lið upp, men higartil hava teir gjørt øllum døprum spádómum fyri skommum. Bert tveir dystir – í Vestmanna og á Skála – eru taptir, og á pappírinum er her helst eisini talan um teir báðar toførastu dystirnar, so tað man undir ongum umstøðum vera nakað gott hugskot, um onkur vestmenningur skuldi fingið hug at undirmett mótstøðuna.



*Í fjør fekk Tjaldur vent vánaligu gongdini ímóti júst StÍF á Skála, men hesa ferð tykist tað tó ikki vera so, at ein endurtøka er væntandi*

## Endurtøka ikki væntandi

Tá Tjaldur í fjør brádliga fekk gongd á sítt kappingarár eftir eina røð av ósigrum, hendi hetta júst á Skála móti StÍF. Undan hesum dystinum eru fortreytirnar á leið tær somu, tó at StÍF ikki var oddalið ta ferðina. Tjaldur hevur – eins og tá – enn ikki fingið nakað stig, men útgangsstøðið er tó kortini nakað øðrvísi. Higartil hava runavíkingarnir hótt einstakar ferðir, men hava kortini verið nakað nógv ov stutir í flestum førum.

Strandingar hava hinvegin víst, at tað so avgjørt ikki er av tilvild, at teir eru ovastir. Fyrsti dysturin varð taptur fyri Kyndli, men síðani hevur tað bara gingið slag í slag, og tað vildi verið løgið, um sjeyndi sigurin á rað ikki kom í hesum dystinum.

# Hvør missur hesaferð

**Hóast bæði Neistin og VÍF høvdu ætlað sær at tikið dystin upp í oddinum í vetur, so eru tey mest sum afturúrsigld av VB, men sunnudagin kann annar parturin í øllum førum koma nærri oddaliðnum**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og hjá monnunum skulu tveir dystir leikast í kvinnudeildini, og talan verður eisini um neyvt somu dystirnar. Nevnliga í Havn millum Neistan og VÍF og á Skála millum StÍF og Tjaldur.

Í Havn snýr dysturin seg eina mest um, hvørt av teimum báðum liðunum skal fáa møguleikan at nærkast oddaliðnum úr Vági nakað., Undan árinum høvdu tey bæði helst ætla sær eina munandi betri støðu, nú grundspælið er komið í helvt, men eins og flestu av hinum liðunum eru hesi rakt av herviligu hondbóltsumfararsjúkuni, sum eitur óstabilitetur.

Skal metast eftir upp- og niðurtúrunum, sum liðini hava havt higartil, so er tað VÍF, sum eigur tørn at vinna hetta vikuskifitð, men úrslitini higartil siga okkum, at tað ber ikki til at rokna við nøkrum sum helst.

Á Skála eigur StÍF annars at vera greiður favorittur, nú Tjaldur kemur á vitjan. Gaman í hevur Tjaldur styrkt um liðið, nú nýggjur málverji er komin, men enn er tað framvegis so, at Tjaldur er at kalla isolerað í botninum. Hinvegin hava tær tó eisini víst, at tær kunnu bíta frá sær, so tað er tó kanska ikki heilt óhugsandi, at tær kunnu skapa okkurt óvæntað úrslit sunnudagin.



*Bæði VÍF og Neistin hava sýnt óstøðug avrik higartil í kappingarárinum, og spurningurin sunnudagin er, hvør teirra hesaferð fer at missa enn tvey stig*





*Seinstu vikurnar hevur Dráttur ment seg heilt nógv, og vil væl til, kunnu tær verða ein verulig hóttan móti Mjølni um vikuskifitð*

**TB og KÍF spæla dupult-uppgerð um vikuskiftið, meðan Dráttur og ÍF skulu royna at fylgja við meistarunum**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fýra dystir skulu leikast í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið. Í tveimum teirra er TB annar parturin, og í báðum førunum er mótstøðuliðið KÍF. Hetta kemst av, at tá TB eftir ætlan skuldi spæla í Havn, var veðrið somikið illsligt, at tað var ikki hugsingur um at koma til Havnar.

Tað er einki at taka seg aftur í, at TB er greiður favorittur í teimum báðum uppgerðunum. Sæð burtur frá fyrsta dystinum, tá tær taptu fyri ÍF, so hevur TB fyri tað mesta sýnt satt meistaraspæl, og teir báðir dystirnir móti KÍF eru dystir, sum skulu vinnast, um sessurin frammi í oddinum skal varðveitast.

## Spenningur í Vágunum

Leygardagin er ein annar dystur á skránni, tá ÍF og Fleyr skulu takast. Vanliga hevur tað verið Fleyr, sum hevur havt takið í hesari uppgerðini, men í ár hevur ÍF spent bogan høgt í royndunum at styrkja um liðið, og einki er at ivast í, at tær undir vanligum umstøðum eru risa favorittar at vinna á Fleyr.

Sunnudagin spæla so Dráttur og Mjølnir, og mangt bendir á, at hetta verður mest spennandi dysturin hjá kvinnunum um vikuskiftið. Tað var tíðliga á árinum annars ikki nógv, sum bendi á, at Dráttur skuldi gera nakrar skreytir í ár, men tær hava ment seg heilt nógv seinasta mánaðin, og tað skal undir øllum umstøðum eitt gott avrik til frá Mjølni, um tær skulu hava øll stigini við sær aftur um Vestmannasund, tá tær leggja leiðina norðureftir.

# Havnar Svimjifelag hevur havt aðalfund

**Nýggj í nevndini eru Elsa Klein Olsen og Jógvan Olsen**

AÐALFUNDUR
*Tíðindaskriv*

Havnar Svimjifelag hevði aðalfund týskvøldið 12. november

Væl av fólkið — bæði svimjarir og foreldur — vóru møtt.

Fundurin byrjaði við at Elisabeth Akursmørk, kostráðgevi, helt fyrilestur um týdningin av røttum kostvanum hjá svimjarum.

Síðan fór fundurin fram eftir lógum felagsins.

Úr nevndini fóru Kári Hentze og Ásmund Joensen, sum ikki stillaðu uppaftur. Nývald í nevndina eru Elsa Klein Olsen og Jógvan Olsen.

Nevndin skipaði seg eftir fundin við Hans Andrias Djurhuus sum formanni, Elsa Klein Olsen sum næstformanni, Unnu Seyer Hansen sum kassameistara, Gunnar H. Gunnarsson sum skrivara og Jógvan Olsen sum nevndarlimi.

# Eingin ivi

**ÍF man vera størsti favoritturin á árinum, tá Fleyr vitjar á Kambsdali**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bert ein dystur verður leiktur í bestu mansdeildini í flogbólti hetta vikuskiftið, og verður hann á Kambsdali millum ÍF og Fleyr. Upprunaliga skuldu Mjølnir og SÍ eisini spæla hetta vikuskiftið, men av givnum orsøkum er hesin dysturin útsettur.

Á Kamsdali man lítil ivi vera um, at fuglfirðingar fara at taka trý sett, tá Fleyr vitjar. Fuglfirðingarnir hava higartil verið púrasta einaráðandi í deildini, og tað er so ikki væntandi, at Fleyr fer at gera nakað við hetta.

Havnarmenninir hava valt at nýta árið til at byggja eitt nýtt lið upp, og fyrsti sigurin hjá hesum fer so ikki at koma í hesum dystinum.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur
17.11 14.30 Neistin-VÍF
17.11 14.30 StÍF-Tjaldur

1. deild kvinnur
17.11 16.00 Neistin-VÍF
17.11 16.00 StÍF-Tjaldur

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur
16.11 13.00 ÍF-Fleyr
16.11 15.00 TB-KÍF
17.11 13.00 KÍF-TB
17.11 14.00 Dráttur-Mjølnir

Meistaradeild menn
16.11 11.00 ÍF-Fleyr

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 6 | 6 - 0 - 0 | 147 | 120 | 27 | 12 |
| 2 | Neistin | 7 | 3 - 1 - 3 | 138 | 139 | -1 | 7 |
| 3 | VÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 135 | 123 | 12 | 6 |
| 4 | Kyndil | 7 | 3 - 0 - 4 | 176 | 167 | 9 | 6 |
| 5 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 147 | 152 | -5 | 6 |
| 6 | Stjørnan | 6 | 2 - 1 - 3 | 122 | 130 | -8 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 6 | 1 - 0 - 5 | 119 | 153 | -34 | 2 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 7 | 6 - 0 - 1 | 208 | 180 | 28 | 12 |
| 2 | VÍF | 7 | 5 - 0 - 2 | 223 | 175 | 48 | 10 |
| 3 | Neistin | 7 | 5 - 0 - 2 | 198 | 175 | 23 | 10 |
| 4 | Kyndil | 7 | 4 - 1 - 2 | 201 | 189 | 12 | 9 |
| 5 | KÍF | 8 | 2 - 1 - 5 | 201 | 207 | -6 | 5 |
| 6 | H71 | 7 | 2 - 0 - 5 | 161 | 199 | -38 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 7 | 0 - 0 - 7 | 165 | 232 | -67 | 0 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 5 | 4 - 1 | 14 | 8 | 6 | 8 |
| 2 | TB | 4 | 3 - 1 | 11 | 4 | 7 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 4 | 3 - 1 | 10 | 5 | 5 | 6 |
| 4 | Dráttur | 4 | 2 - 2 | 8 | 9 | -1 | 4 |
| 5 | Fleyr | 5 | 1 - 4 | 4 | 12 | -8 | 2 |
| 6 | KÍF | 4 | 0 - 4 | 3 | 12 | -9 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 4 | 4 - 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 | Mjølnir | 3 | 2 - 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 3 | Fram | 4 | 2 - 2 | 7 | 6 | 1 | 4 |
| 4 | SÍ | 3 | 1 - 2 | 3 | 6 | -3 | 2 |
| 5 | Fleyr | 4 | 0 - 4 | 0 | 12 | -12 | 0 |